# Tær yngstu duga eisini

**KÍ vann farna vikuskiftið kappingina hjá pinkum eftir spennandi endaspæl á Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ hevur seinastu fýra árini verið mest sum einaráðandi í føroyskum kvinnufótbólti, og aftur í ár hava kvinnurnar hjá KÍ vunnið bæði steypakapping og landskapping, umframt at tær hava spælt í meistarakappingini hjá UEFA.

Men tað eru ikki bara tær vaksnu, sum duga at spæla fótbólt í Klaksvík, tí KÍ vann farna vikuskifti eisini kappingina hjá teimum yngstu gentunum – pinkunum.

Tvey finaluumfør hava verið spæld, og tey vóru sera spennandi. Eftir fyrra umfarið, sum varð spælt í Havn, var KÍ fremst við 5 stigum, HB hevði 4, Skála 3 og AB einki.

Seinna finaluumfarið var á Skála leygardagin, og har gjørdist kappingin sera spennandi. Tá ið alt kom til alt stóðu KÍ og HB á jøvnum í stigum, men KÍ hevði betri málmun, og so kundu tær yngstu úr Klaksvík prýða seg við gulli. Skála gjørdist nummar 3 og AB nummar 4.



*KÍ føroyameistari hjá pinkum 2003. Aftan frá vinstru: Maria við Neyst, venjari, Rúna Bjartalíð, Louisa Østerø, Elsbeth Danielsen, Una Joensen, Lena Viðbjørg og Bára S. Klakstein, venjari. Framman frá vinstru: Guðrið Eystberg, Bára Steinberg, Erika Niclasen, Eyðvør Klakstein, Beinta Mikkelsen og Maria Andreassen*

# FM í einkultstarti fyri børn

**Seinasta kappingin á árinum varð hildin leygardagin, tá børnini dystaðust uppi á Oyggjarvegnum**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Um vikuskifti skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri súkklukapping fyri børn. Kappast var í einkultstarti. Sum nakað nýtt varð súkklað uppi á Oyggjarvegnum, hetta fyri at sleppa undan tungari ferðslu. Mál og startur var á Kleynisvarða, og varð súkklað ímóti Lambafelli. Tey yngstu vendu ein km frá málinum, tey 9 til 11 ára gomlu og gentur 12 til 14 ár vendu tveir km frá málinum.



*Eftir kappingina hittust luttakararnir í ÍSF-húsinum, har tey kundu leska sær á eftir strævnu kappingina*

Dreingir 12 til 14 ár koyrdu longra teinin tvær ferðir ígjøgnum.

Eftir kappingina, sum var tann seinasta á árinum, fingu luttakararnir heiðursmerki frá Statoil, umframt at Føroya Bjór hevði latið okkurt leskandi til tiltakið.

**Úrslitini av kappingini vóru hesi**

**Gentur undir 8 ár, 2 km**

| Nr Navn | Tíð |
|---|---|
| 1 Hildur Poulsen | 9,26 |

**Dreingir undir 8 ár, 2 km**

| | |
|---|---|
| 1 Jógvan Mellemgaard | 5,39 |
| 2 Kristian Johansen | 6,41 |
| 3 Sofus Andreasen | 7,18 |
| 4 Jákup Ólason | 8,13 |

**Dreingir 9-11 ár, 4 km**

| | |
|---|---|
| 1 Finnur Mellemgaard | 9,53 |
| 2 Jógvan Ólason | 9,56 |
| 3 Harald Joensen | 12,06 |
| 4 Jens P. Johansen | 16,20 |

**Gentur 12-14 ár, 4 km**

| | |
|---|---|
| 1 Rakul Jakobsen | 10,38 |
| 2 Sólja Christiansen | 12,47 |

**Dreingir 12-14 ár, 8 km**

| | |
|---|---|
| 1 Torkil Weyhe | 14,49 |
| 2 Sigmund Olsson | 16,04 |
| 3 Rúni Bláfoss | 17,07 |
| 4 Rani Jacobsen | 18,01 |
| 5 Niels Christiansen | 18,28 |

# Tróndheim fyri tólvtu ferð

**Sogndal hevur mist takið í toppinum, og Molde er akkurát leyst úr botninum, har Lyn fremvegis er í vanda, sjálvt um teir hesa ferð vunnu í Sogndal**

NOREG
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin*

Tað hevur hilnast illa hjá klaksvíkingum í fótbólti í ár. Troystin er neyvan serliga stór í tí, men tað er ein veruleiki, at norski vinarbýurin hjá Klaksvíkini í Noregi eigur klárt besta fótbóltsliðið í grannalandinum fyri vestan.

Rosenborg úr Tróndheimi er framúr. Tað resta fýra umfør av norsku kappingini. Men sunnudagin varð tað endaliga staðfest, sum tað hevur verið roknað við alt kappingarárið. Rosenborg er meistari fyri tólvtu ferð á rað. Talan er um átjanda meistaraheitið hjá felagnum, sum harvið er eitt frammanfyri talið hjá vinarbýnum í Føroyum.

Tað var rættuliga undirhaldandi, tá ið meistaraskapurin endaliga varð tryggjaður. Rosenborg var á Lerkendal frammanfyri 4–0 ímóti Bodø/Glimt, tá ið seinna umfarið var tveir minuttir gamalt. So hugsaðu teir í Tróndheimi og Rosenborg meiri um sigursveitslu, enn teir hugsaðu um at spæla fótbólt og verja, men kortini megnaðu teir at vinna 5–4!

Hóast tapið er Bodø/-Glimt greitt nummar tvey, og teir fara ivaleyst at vinna silvurmerkini. Tað eru fimm stig aftur til Odd Grenland, sum í gjárkvøldið skuldi spæla ímóti Viking í Stavanger.

Í botninum lætti Aalesund sær nærri kappingarneytunum, tá ið teir vunnu 2–1 ímóti Lillestrøm, sum ikki er tað, sum Lillestrøm áður var. Lyn lætti sær eisini eitt sindur á. Á útivølli í Sogndal vunnu teir 2–1. Sigursmálið fingu teir í yvirtíðini við brotssparki, sum norsku fjølmiðlarnir mettu rættuliga ivasamt.

Tromsø sleit seg trý stig framum tey liðini, sum stríðast mest fyri at sleppa undan niðurflytingini. Teir vunnu 2–0 á heimavølli ímóti Bryne, sum tapti fyri ellintu ferð á rað á útivølli. Bryne er næstniðast – bara eitt stig frammanfyri Aalesund. Vålerengen er undir liðini á Bryne. Hesa ferð megnaði Vålerengen 2–2 á heimavølli ímóti Stabæk, sum er við í kappingini um bronsukrónurnar. Teir kappast við Odd Grenland og Viking Stavanger, sum skuldu spæla í gjárkvøldið.

Molde var á odda 2–0 í Bergen í 1. hálvleiki. Men teir megnaðu ikki at halda tørn. Brann skoraði trý mál, og harvið fór Brann eitt stig framum Molde.



TILSKERING OG SEYMING

1012 kr. 680,- Hóskvøld 19.00 - 22.30 Emly Maria Olsen Hoyvíkar Skúli
1008 kr. 680,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 Sólvør Jacobsen Kommunuskúlin
1014 kr. 680,- Mikukvøld 19.00 - 22.30 Beinta Vilhelmsen Kommunuskúlin
1021 kr. 680,- Hóskvøld 19.00 - 22.30 Una Weihe Kommunuskúlin
1009 Kr. 680,- Hóskvøld 19.00 - 22.30 Eyð Skúvadal Brúni Skúli

VIKUSKIFTISKEIÐ
1010 Kr. 650,- 3 fyri jól og 5 eftir Jól Eyð Skúvadal Brúni Skúli

GER TÍTT PERSÓNLIGA MYNSTUR
1005 kr. 650,- 3 vikuskifti fyri jól Trina Hansen Hoyvíkar Skúli
5 vikuskifti eftir jól

PATCHWORK OG APPLIKATIÓN
1006 Kr. 680,- Týskvøld 19.00 - 22.30 Annlis Sverradóttir Kommunuskúlin

KREATIV SEYMING, endurnýtsla
1019 kr. 680,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 Dania Pau Danielsen Brúni skúli
1020 kr. 680,- Mikukvøld 19.00 - 22.30 - -

BINDING OG HEKLING
1011 kr. 680,- Týskvøld 19.00 - 22.30 Súsanna Magnussen Skúlin á Hvítanesi

YMISKT HANDARBEIÐI
1024 kr. 590,- Mánadag 16.00 - 18.35 Jenny Simonsen Hoyvíkar Skúli
1025 kr. 680,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 - Hoyvíkar Skúli
1026 kr. 590,- Mikudag 16.00 - 18.35 - Argja Skúli
1027 kr. 680,- Mikukvøld 19.00 - 22.30 - Argja Skúli
1030 kr. 590,- Týsdag 16.00 - 18.30 Beinta Dalbø Brúni Skúli
1031 kr. 680,- Týskvøld 19.00 - 22.30 - -
1007 kr. 680,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 Martha Justesen Gamli Føroya Banki

YMISKT HANDARBEIÐI- broderí, føroysk bond o.a.
**Flokkur 1**
1015 kr. 650,- Hóskvøld 18.30 - 22.55 Paulina Eliasen Kollafjørður
og fríggjadag 14.00 - 18.25 -
**Flokkur 2**
1016 kr. 650,- Fríggjakvøld 18.30 - 22.55 - -
og leygardag 09.00 - 13.25 - -

MASKINBINDING
VIKUSKIFTISSKEIÐ - 2 flokkar, byrjan og framhald
1028 kr. 650,- 3 vikuskifti fyri jól Elspa Petersen Brúni Skúli
5 vikuskifti eftir jól

TØVING um skúlin fær útvega høli
1045 kr. 650,- 3 vikuskifti fyri jól og 3 vikuskifti eftir jól
Leygardag 10.00 - 17.00 Margit Glerfoss og Herbjørg Dalsgaard

PERLUSEYMING
1032 kr. 650,- 3 Vikuskifti fyri jól Miriann Dam Kollafjørður
5 Vikuskifti eftir jól -

**GRAFIKK, LEIRARBEIÐI, TEKNING OG MÁLING**

Floksnr. Gjald GRAFIKK - ymisk prent
1501 kr. 680,- Mánakvøld 18.00 - 21.35 Jóna Rasmussen Listaskúlin Kongagøta 7

LINOLEUMSKURÐUR - byrjunarflokkur
1502 kr. 680,- Mánadag 14.30 - 18.00 Aase Bømler Olsen Listaskúlin Kongagøta 7

TEKNING OG MÁLING
1518 kr. 680,- Mikukvøld 19.00 - 22.30 Randi Gunnarsdóttir Listaskúlin Kongagøta 7
1513 kr. 680,- Hóskvøld 19.00 - 22.30 Sofus Poulsen Listaskúlin Kongagøta 7
**Vikuskiftisskeið**
1519 kr. 650,- 3 vikuskifti fyri jól Randi Gunnarsdóttir Kollafjørður
5 vikuskifti eftir jól

MODELLTEKNING
1500 kr. 680,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 Ole Wich Listaskúlin Kongagøta 7

3001 kr. 590,- Mánakvøld 19.00 - 22.30 Aki Simonsen Listaskúlin Kongagøta 7
og mikukvøld 19.00 - 22.30 -

FOTO byrjan
3003 kr. 680,- Mikukvøld 19.00 - 22.30 Olaf Sneider Listaskúlin Kongagøta 7

FOTO framhald
3004 kr. 680,- Týskvøld 18.30 - 21.10 Olaf Sneider
Undirvíst verður eisini 2 leygardagar í november 2003

**FIMLEIKUR OG SVIMJING**

Floksnr. Gjald FIMLEIKUR
**fyri fólk við ringum ryggi**
3500 kr. 350,- Týskvøld 18.00 - 18.45 Randi Petersen Læraraskúlin
3501 kr. 350,- Týskvøld 19.00 - 19.45 - -

MOTIÓNSFIMLEIKUR
3510 kr. 350,- Mánakvøld 19.00 - 20.25 Erla í Húsinum Kollafjørður

SVIMJING fyri fólk við ringum ryggi
3503 kr. 350,- Hósdag 15.15 - 16.00 Berit Lisberg Larsen Eysturskúlin
3504 kr. 350,- Hósdag 16.00 - 16.45 - -

SVIMJING Bechterew
3512 kr. 350,- Hósdag 16.45 - 17.30 Karin Djurhuus Eysturskúlin

SVIMJING fyri fólk við gikt
3513 kr. 350,- Hóskvøld 17.30 - 18.15 Karin Djurhuus Eysturskúlin

SVIMJING kokuloysn og fibromyalgi
3502 kr. 350,- Mikudag 16.00 - 16.45 Hervør Eyðinsdóttir Landssjúkrahúsið svimjihylur

VATNFIMLEIKUR/FØÐIFYRIREIKING (24 - 30 vikur við barn)
3519 kr. 350,- Hóskvøld 18.15 - 20.50 Anna Christiansen Eysturskúlin, svimjihylur og skúlastova D 4

LÆRIÐ AT SVIMJA
3506 kr. 350,- Týskvøld 17.30 - 18.15 Rubek Lilaa Eysturskúlin
3507 kr. 350,- - 18.15 - 19.00 - -
3508 kr. 350,- - 19.00 - 19.45 - -

**MATGERÐ**

Floksnr. Gjald KLÆNKISKEIÐ byrjar 6. okt.
**Fyri fólk, ið viga í minsta lagi 20 kg ov nógv**
4000 kr. 590,- Mánadag 16.00 - 18.35 Anne Grete Harlou Eyturskúlin inngongd í Dj. í Geilgøtu

VANLIGT KLÆNKISKEIÐ
byrjar 6. okt.
4001 kr. 590,- Mánakvøld 19.00 - 21.35 Anne Grete Harlou Eyturskúlin inngongd í Dj. í Geilgøtu
byrjar 7. okt.
4002 kr. 590,- Týsdag 16.00 - 18.35 -
4003 kr. 590,- Týskvøld 19.00 - 21.35 - -

MATGERÐ FYRI PENSIONISTAR - byrjar 8.okt og 10. okt
**Tørvurin á vitaminum og mineralum minkar ikki við árunum, tí er tað týdningarmikið at eta góðan mat.**
4004 Mikudag 10.00 - 13.30 Anne Grete Harlou Tilhaldið í Tórsgøtu
4005 Fríggjadag 10.00 - 13.30 - -

**ÆTTARGRANSKING**

Floksnr. Gjald ÆTTARGRANSKING Á TELDU
4006 kr. 680,- Týskvøld 19.00 - 22.30 Ingi Ellingsgaard Venjingarskúlin
4007 kr. 680,- Hóskvøld 19.00 - 22.30 - -

4504 kr. 590 Tíð og stað verður avtalað við næmingarnar

FØROYSK RÆTTSKRIVING, MÁLLÆRA OG MÁLRØKT
4503 kr. 590,- Mánakvøld18.15 - 20.50 Eyðun á Borg Venjingarskúlin stova 72

FØROYSKT FYRI ÚTLENDINGAR - eisini AFS-arar
FAROESE FOR FOREIGNERS English Tongue
**Starting Tuesday 21. okt.**
4502 kr. 480,- Tuesday 18.00 - 19.50 Eyðun á Borg Venjingarskúlin stova 72

FÆRØSK FOR SKANDINAVER
4518 kr. 480,- Mánakvøld 18.00 - 19.40 Regin av Steignum Venjingarskúlin stova 72
4519 kr. 480,- Mánakvøld 20.00 - 21.40 - -

ÍSLENDSKT byrjanarflokkur
4513 kr. 590,- Mikukvøld 19.00 - 21.35 Johanna Traustadóttir Venjingarskúlin

LÆRIÐ ENSKT Á ENSKUM
4524 kr. 480,- Týskvøld 19.00 - 20.40 Sharon Christiansen Kommunuskúlin st. 105

ENSKT
**Enskt 1**
4507 kr. 480,- Mikukvøld 18.00 - 19.40 Bergur Rasmussen Kommunuskúlin st. 104
**Enskt 2**
4508 kr. 480,- Mikukvøld 19.50 - 21.20 - -
**Enskt 3**
4522 kr. 480,- Mikukvøld 18.00 - 19.40 Sharon Christiansen Kommunuskúlin st. 104
**Enskt 4**
4523 kr. 480,- Mikukvøld 19.50 - 21.30 - -

FRANSKT
4500 kr. 480,- Mikukvøld 19.00 - 20.40 Alda Joensen Kommunuskúlin

SPANSKT
4526 kr. 480,- Hóskvøld 19.00 - 20.40 Kristianna W. Poulsen Kommunuskúlin st. 101

RUSSISKT fyri byrjarar og framkomin
4517 kr. 590,- Mikukvøld 19.00 - 21.35 Bozena Rasmussen Kommunuskúlin st. 105

**EYKATILBOÐ FYRI MENNINGARTARNAÐ OG RØRSLUTARNAÐ**

Tilmeldingargjald kr. 300,-

Floksnr. MATGERÐ byrjar 23. okt.
8022 Hósdag 16.00 - 18.35 Anne Grete Harlou Eysturskúlin

YMISKT HANDALIGT ARBEIÐI
**Seyming,træsmíð og tilevning**
8080 Týsdag 16.00 - 19.30 Aimy Djurhuus, Hedvig R. Davidsen, Regin Samuelsen, Oddvør Petersen, og Mirjam J.R. Olsen Verkstaðið Vón

TILEVNING - tekning, máling og leir
8012 Mánadag 16.25 - 19.00 Arngerð og Susanne Skúlin á Trøðni
8013 Mánakvøld 19.10 - 21.35 Arngerð og Monika Joensen -

TEKNING OG SILKIMÁLING
8048 Fríggjadag 12.00 14.35 Arngerð og Susanne Skúlin á Trøðni

SVIMJING í EYSTURSKÚLANUM
**SVIMJING FYRI MENNINGARTARNAÐ**
8086 Mánadag 16.00 - 17.30 Tóra Hansen og o.o. Eysturskúlin

SVIMJING FYRI RØRSLUTARNAÐ
8087 Mánadag 17.30 - 19.00 Tóra Hansen og Mats Brisenfeldt -

SVIMJING FYRI SJÓNVEIK OG BLIND
8055 Mikudag 16.00 - 17.30 Jóhan M. Stenberg Eysturskúlin